# ONGAN OBAMA

**HÓAST FLOKSFORMENN EIGA AT VERA STINNIR Í POLITISKUM SAMSKIFTI OG MUGU VÆNTAST AT VERA GÓÐ POLITISK BRAND, ER SO NEVNDA »BRANDVIRÐIÐ« HJÁ FLOKSFORMONNUNUM ÓJAVNT. NEYVAN ER NAKAÐ SUPERBRAND Í FØROYSKUM POLITIKKI, MEN HINVEGIN ER ONGIN FORMAÐUR HEILT UTTAN BRANDVIRÐI. LØGMAÐUR MÁ METAST SUM EITT VEIKT BRAND, MEÐAN BRANDIÐ HJÁ ANDSTØÐULEIÐARANUM ER STERKT**




### Høgni Hoydal TJÓÐVELDI

Formaðurin í Tjóðveldi er **»tann professionelli«** samskiftarin. Við samskiftisútbúgving og royndum sum tíðindamaður spælir Høgni Hoydal samskiftisorglið meistarliga. Hann er dugnaligasti samskiftarin millum floksformenninar. Høgni Hoydal hugsar strategiskt og taktiskt og dugir væl at selja politikk. Viðhvørt missir hann fótafestið og fer um ósjónliga markið, har hann setur spurningarnar heldur enn at svara teimum. Tað kann tykjast ágangandi fyri summi. Høgni Hoydal er nógv frammi alment og í vanda fyri **»yvireksponering«**. Politiska brand hansara hevur stórt virði, men slit sæst nú á tí.




### Kári á Rógvi SJÁLVSTÝRISFLOKKURIN

Formaðurin í Sjálvstýrisflokkinum er nýggjur í fomanssessinum, so trupult er at meta um hansara samskifti sum floksformaður. Politiska samskiftið hjá Kára á Rógvi higartil sum løgtingsmaður hevur verið merkt av **»signalforvirringi«**. Hann er ungur og nýggjur í politikki, men stundum eru argumentatión og røður sum hjá gomlum politikara. Helst leitar Kári á Rógvi framvegis eftir sínum egna stíli, og tað kann ørkymla. Hinvegin er fáur stinnari í løgfrøðiliga stoffinum, og humoristiski sansurin ger eisini mun samskiftisliga. Kári á Rógvi er eitt veikt politiskt brand, men har er vakstrarpotentiali.




### Jørgen Niclasen FÓLKAFLOKKURIN

Politiskt blóð rennur í æðrunum hjá formanni Fólkafloksins, ið dugir sítt politiska handverk. Samskiftisliga leggur hann sær orðini væl, er skjótur í replikkini og kemur skjótt til sakina. Tað er gott í fjølmiðlum, har tíðindi skulu berast skjótt. Størsti samskiftisligi veikleikin er, at Jørgen Niclasen kann tykjast **»belærandi«** og at tala niður til hyggjarar og lurtarar. Pallurin í uttanríkisráðnum gevur fjølmiðlatíð og sjónligheit, men Jørgen Niclasen fær ov lítið burtur úr pallinum. Politiska brandið, ið var sterkt áðrenn formanstíðina, tá Jørgen Niclasen millum annað umsat fiskivinnumál, er viknað.



*Per Højgaard, sum hevur arbeitt sum samskiftisráðgevi í fleiri ár*

kvinna, lærari, timburmaður, pedagogur, samfelagsfrøðingur, ítróttarfólk, bankastjóri og fleiri onnur. Tað eru hesi fólkini, sum atkvøða fyri politikaranum.

Myndin av politikaranum verður teknað í fjølmiðlunum.

– Politikarin noyðist at leggja sær orðini væl, tí øll skulu skilja teg. Tað tykist ofta sum, at politikarin gloymir, hvønn hann tosar við. Tá er tað, at vit hoyra og síggja politiska ull koma úr munninum á politikaranum, sigur Per Højgaard.

Hann nevnir Kára á Rógvi, formannin í Sjálvstýrisflokkinum, sum stundum hevur eitt akademiskt orðaval á høgum abstraktiónsniveau.

– Kári á Rógvi er skilagóður, men hann gloymir onkuntíð at seta seg niður á eitt støði reint orðavalsliga, har øll kunnu vera við. Tað er náttúrligt at gloyma tað, men tað er ikki gott samskifti, sigur Per Højgaard.

Samskiftisráðgevin vísir á tvær deyðssyndir innan samskifti.

> **Politikarin noyðist at leggja sær orðini væl, tí øll skulu skilja teg. Tað tykist ofta sum, at politikarin gloymir, hvønn hann tosar við**

– Sum politikari mást tú ongantíð verða illur á skíggjanum, og tú mást heldur ongantíð lúgva. Tað kemur aftur um brekku, sigur hann.

Politikarar, sum hava verið í politiki í fleiri valskeið, ella ikki hugsa stórvegis um samskifti, hava lyndi til at snakka leingi og upp í saman.

Endamálið hjá teimum er at vinna so nógva tíð í loftmiðlunum sum gjørligt.

– Tað hjálpir at hava ein vinkul. Boðskapurin skal vera greiður og stuttur, og tú skal koma skjótt til sakina. Í miðlunum missa fólk tráðin eftir fáum sekundum, so tey fyrstu fimm til 10 sekundini mugu brúkast effektivt og sannførandi, sigur Per Højgaard.

## Djurholm ov sjónligur

Politikarar eru sum heild sjónligir í samfelagnum. Tað er gongdin, tá teir við jøvnum millumbilum koma fram við sínum sjónarmiðum.

Sambært Per Højgaard er tó mark fyri, hvussu ofta veljarin vil hoyra og síggja ein einstakan politikaran.

Fólkafloksmaðurin Bjarni Djurholm sat sum landsstýrismaður í vinnumálum í árunum frá 2000 til 2008. Per Højgaard heldur, at Djurholm var í so sjónligur, og hann varð skjótt slitin. Ella »yvireksponeraður«, sum tað eitur á fakmálinum.

Fólk tíma ikki at hoyra og síggja somu fólkini dag út og dag inn. Bjarni Djurholm misti undirtøku við seinasta løgtingsval.

## Lítla samfelagið ávirkar

Føroyska samfelagið er lítið. Ein evarska lítil bygd í Evropa.

Tað kann ávirka trúvirðið hjá tí einstaka politikaranum, tí fólk kenna og vita nógv um onnur.

Tað er millum annað tí, at tað er torført at samanbera føroysk løgtingsfólk við stórpolitikarar uttanlands.

Per Højgaard nevnir Heina O. Heinesen, sum alt sítt politiska lív hevur talað sakina hjá útróðrarmonnunum. Hann er ikki serliga sjónligur, hann samskiftir ikki serliga væl við meirilutan, og hann kemur ikki upp á tindin sum karismatiskur politikari.

– Men Heini O. Heinesen er hinvegin í eini serstøðu í føroyskum politikki. Hann hevur sín heilt egna stíl og er ein superstjørna – eitt slag av politiskum superbrandi – hjá sínum politiska málbólki. Og hann má fyri alt í verðini ikki broyta sín politiska persón, sigur Per Højgaard.

Men vegurin úr Kunoy til Washington er kortini langur.